ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Amerikonsk álop, sum kosta sivilum afghanum lívið, breiðka gjónna millum afghonsku stjórnina og fólkið*

*Hamid Karzai, forseti*

# Enn liggur ein kjarnorkubumba undir grønlendska ísinum

**Fýra kjarnorkubumbur vóru í amerikanska flogfarinum, sum datt niður við Thule. Ein teirra bleiv ikki funnin aftur**



*Amerikanska herstøðin í Thule*

*Mynd: Polfoto*

Tann 21. januar í 1968 datt eitt amerikanskt B52-bumbuflogfar niður tætt við Thule-herstøðina í Grønlandi. Umborð á flogfarinum vóru fýra kjarnorkubumbur, og ein teirra kom ikki afturíaftur.

Tað sigurt bretska kringvarpið BBC, sum hevur tosað við John Haug og Joe D'Amario, sum vóru við amerikanska flogfarinum. Harafturat hevur BBC fingið atgongd til amerikonsk skjøl, sum higartil hava verið skrásett sum loynilig.

Spreingievnið, sum var uttan um tær fýra kjarnorkubumburnar, brast, tá flogfarið datt niður, men ikki kjarnorkuløðingarnar, og heimurin slapp tí undan einari ovirstórari kjarnorkuvanlukku.

Fleiri túsund petti av flogfarinum vórðu funnin teir fyrstu mánaðirnar aftan á vanlukkuna, og tað vóru danskir og grønlendskir arbeiðsmenn, sum ruddaðu økið. Herumframt varð ein rúgva av geislavirknum ísi flutt burtur haðani.

Tann almenna frágreiðingin hjá amerikanska verjumálaráðnum Pentagon var, at allar tær fýra kjarnorkubumburnar vóru „oyðilagdar", men skjølini, sum BBC hevur hugt í, vísa, at ruddingarmenninir funnu bara pettir av trimum teirra. Bumban, sum hevði verksmiðjunummarið 78252, var ikki at finna, og teir amerikonsku serfrøðingarnir stúrdu fyri, at hon var farin niður ígjøgnum ísin.

## Danir hildnir uttanfyri

Tríggjar mánaðir aftan á vanlukkuna við Thule sendu amerikanararnir ein kavbát at leita eftir teirri fjórðu kjarnorkubumbuni. Sambært BBC vórðu donsku myndugleikarnir ongantíð kunnaðir um leitingina, og í skjølunum hjá Pentagon stendur beinleiðis, at um danir spyrja, skulu teir fáa tað svar, at kavbáturin gjørdi nakrar uppmátingar á havbotninum.

Bæði uran og plutonium vóru í bumbuni, sum hvarv við Thule, men skjølini hjá verjumálaráðnum í Washington vísa, at amerikanska herleiðslan stúrdi mest fyri, at sovjetskir kavbátar kundu finna bumbuna og fáa fatur á tøkniligum loyndarmálum í henni.

Amerikanski kavbáturin fann onga kjarnorkubumbu, og amerikanska metingin var, at heldur ikki sovjetskir kavbátar fóru at finna ta fjórðu bumbuna.

Í dag vil Pentagon ikki gera viðmerkingar til tíðindini hjá bretska kringvarpinum, men fleiri amerikanskar keldur vátta fyri BBC, at tann fjórða kjarnorkubumban bleiv ongantíð funnin.

# Hildu seg hava funnið Mladic

**Serbisku myndugleikarnir hildu seg hava funnið krígsbrotsmannin Ratko Mladic á einari verksmiðju, men hann var ikki at finna**



*Servandir, serbiskir hermenn leitaðu eftir Ratko Mladic í býnum Valjevi*

*Mynd: AFP*

Servandir, serbiskir hermenn við sjálvvirkandi vápnum kringsettu í gjár eina verksmiðju í býnum Valjevi har vesturi í landinum, tí onkur hevði boðað myndugleikunum frá, at tann eftirlýsti krígsbrotsmaðurin Ratko Mladic fjaldi seg á verksmiðjuni.

Hermenninir rannsakaðu hvønn krók á verksmiðjuni, men har var eingin Mladic at finna. Enn eina ferð hevði fyrrverandi bosniaserbiski generalurin hildið serbisku myndugleikarnar fyri gjøldur.

- Átakið í Valjevi var liður í einum størri átaki, sum hevur til endamáls at taka Ratko Mladic og tey, sum veita honum fíggjarligan stuðul, meðan hann fjalir seg, sigur ein kelda hjá serbiska ríkisákæranum við fjølmiðlarnar.

Síðani serbisku myndugleikarnir handtóku og útflýggjaðu fyrrverandi bosniaserbiska leiðaran Radovan Karadzic, hava myndugleikarnir lagt uppaftur størri dent á at finna Mladic.

ES hevur kravt, at Serbia skal taka og útflýggja Mladic, áðrenn ein serbisk umsókn um limaskap kann koma til viðgerðar.

## STUTT SAGT

### Walesa ikki boðin við

Nógvir póllendingar eru í øðini inn á landsins forseta, Lech Kaczynski, tí hann hevur ikki boðið fyrrverandi fakfelagshetjuni og forsetanum Lech Walesa við til eitt hátíðarhald, sum verður hildið í sambandi við, at 90 ár eru liðin, síðan Pólland fekk sjálvræði.

Lech Kaczynski hevur boðið leiðarunum í teimum flestu grannalondunum umframt øðrum leiðarum til hátíðarhaldið. Teirra millum eru týski kanslarin, Angela Merkel, ukrainski forsetin, Viktor Jusstsjenko, og av meiri fjarskotnum leiðum kemur afghanski forsetin, Hamid Karzai.

Men Lech Walesa stendur ikki á gestalistanum, og tað hevur fingið fleiri polskar politikarar at finnast at vali forsetans. Eitt nú hevur uttanríkisráðharrin, Radek Sikorski, gjørt greitt, at hann ætlar sær til hátíðarhaldið, men hann sigur, at tað verður trupult at greiða gestunum frá, hví tey ikki síggja Lech Walesa við borðið, og hví htey ikki kunnu fáa orð á fyrrverandi forsetan.

### Netanyahu sigur seg ætla frið

Benjamin Netanyahu, sum er formaður í Likudflokkinum í Ísrael, sigur nú, at verður hann forsætisráðharri aftan á valið, fer hann halda fram við friðarsamráðingunum við palestinar.

Sambært blaðnum Ha'arets skal Netanyahu hava sagt hetta á einum fundi við fyrrverandi bretska forsætisráðharran Tony Blair, sum nú arbeiðir sum sendimaður hjá teirri sokallaðu Miðeystkurkvartettini. Netanyahu hevur annars borið orð fyri at vera ímóti friðarroyndunum, og talsmaður hansara segði fyri stuttum, at royndirnar at fáa frið við palestinar vóru miseydnaðar, og at tað var eingin orsøk til at halda fram við teimum.

Tjóðartingsval verður í Ísrael í februar, og meiningakanningar vísa, at tað fer at standa á jøvnum millum Tzipi Livni, sum hevur staðið á odda fyri friðarsamráðingunum hjá núverandi stjórnini, og Benjamin Netanyahu.

Tzipi Livni, sum hevur verið uttanríkisráðharri í stjórnini hjá Ehud Olmert, hitti fyrradagin palestinska forsetan, Mahmoud Abbas. Aftan á fundin søgdu tey bæði, at friðarsamráðingarnar halda fram aftan á nýggjár.